**Føroya Óðalsfelag**
**Boks 2080**
**165 Argir**

# TÍÐINDASKRIV

7. oktober 2007

## Aðalfundur 2007

Í góðveðrinum sunnudagin 7. oktober helt Føroya Óðalsfelag aðalfundin 2007.

...

Aðalfundurin samtykti at heita á løgmann um at forða fyri, at nýggja lógin um landsjørð verður sett í gildi. Lógin verður ein vanlukka fyri møguleikarnar hjá landsins myndugleikum at ráða yvir landsins jørð. Ásetingin um umsetilig festibrøv merkir, at festini verða seld, uttan at greiða er fingin á støðuni hjá traðarfólki, uttan at jørð verður sett av til almenn endamál, og uttan at eitt oyra fer í landskassan.

Óðalsfelagið vísir á, at landsins myndugleikar fingu ónøktandi ráðgeving frá nevndini, ið gjørdi uppskotið til nýggja lóg um landsjørð, millum annað varð minnilutaálitið hjá umboðum felagsins ongantíð lagt fyri landsstýrið og løgtingið undir viðgerðini.

Tíbetur er lógin ikki enn sett í gildi, og hevur løgmaður tí møguleika at steðga lógini, so farast kann undir arbeiðið av nýggjum, og tryggjað verður at landsjørð verður brúkt til landsins endamál.

Felagsins vegna

Kári á Rógvi,
Blaðstjóri á óðalstíðindum.

...

Kassameistari: Daniel Johan Poulsen í Havn, 31 42 04
Teldupostur kassameistarans: hdp@post.olivant.fo
Adressa Felagsins: postboks 2080, 165 Argir